

Frágreiðing 2011:2

# Náttúruvernd og náttúrufyrisiting

umhvørvisstovan
environment agency

ISBN: 978-99918-819-6-6

**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

# Innihaldsyvirlit

1 TILMÆLI 2

2 INNGANGUR 3

3 VERANDI SKIPAN 4

3.1 NÁTTÚRUFRIÐINGARLÓGIN 4
3.2 MYNDUGLEIKARNIR 4
3.2.1 LANDSSTÝRIÐ 5
3.2.2 LOKALU FRIÐINGARNEVNDIRNAR 5
3.2.3 YVIRFRIÐINGARNEVNDIN 5
3.3 FYRISITINGIN 6
3.4 ÚTREIÐSLUR TIL VERANDI NÁTTÚRUFYRISITING 8

4 DAGFØRING AV FYRISITINGINI 9

4.1 UPPSKOT TIL BROYTINGAR 9
4.2 FYRISITINGARLIGUR STOVNUR 10
4.3 LÓGARBROYTING 12
4.3.1 ÁRINSMETINGAR, KANNINGAR O.A. 13
4.3.2 EFTIRLIT 13
4.3.3 NÁTTÚRUVERND TIL EIN FYRISITINGARLIGAN STOVN 13

5 VERANDI FRIÐINGAR 14

5.1 ØKISFRIÐINGAR 14
5.1.1 LEYNAVATN 14
5.1.2 MØLHEYGGJAR 15
5.1.3 FJALLAVATN 15
5.1.4 TOFTAVATN 16
5.2 AÐRAR FRIÐINGAR 16
FYLGISKJAL 1: SAMANDRÁTTUR AV LØGTINGSLÓG UM NÁTTÚRUFRIÐING 18
FYLGISKJAL 2: UPPSKOT TIL LÓGARBROYTINGAR 20
FYLGISKJAL 3: LÝSING AV FRIÐAÐUM ØKJUM 22

# 1 Tilmæli

- Mælt verður til, at fyrisitingin av náttúruvernd verður løgd til ein stovn undir landsstýrismanninum, sum hevur fyrisitingarligar royndir og fakligar førleikar á náttúruøkinum.

- Mælt verður til, at skipanin við lokalum friðingarnevndum og yvirfriðingarnevnd verður avtikin.

- Mælt verður til, at gjørdar verða broytingar í náttúruverndarlógini, sum heimila omanfyri nevndu broytingum.

# 2 Inngangur

Henda frágreiðing er úrslit av eini verkætlan, hvørs endamál er at lýsa fyrisitingina á náttúruøkinum, og at gera uppskot til at nútímansgera fyrisitingina innan karmarnar av galdandi náttúrufriðingarlóg.

Verkætlanin er fíggjað av Innlendismálaráðnum av játtanini umhvørvisverndartiltøk

Fyrisitingin av økinum náttúruvernd er skipað eftir galdandi náttúruverndarlóg[1] frá 1970. Samfelagið er nógv broytt hesi fjøruti árini, og ikki minst fyrisitingin, og er tí tørvur á at dagføra lógina og fyrisitingina. Arbeitt hevur verið við uppskoti til nýggja náttúruverndarlóg í nøkur ár, men enn er hetta arbeiði ikki liðugt, og verður nýggj lóg helst ikki sett í gildi í næstu framtíð.

Í frágreiðingini verður víst á, hvørjar broytingar í verandi náttúrufriðingarlóg eru neyðugar fyri at nútímansgera fyrisitingina, uttan at ein heilt nýggj lóg verður samtykt.

Ætlanin er tó ikki, at hetta skal støðga arbeiðinum við at orða nýggja náttúrufriðingarlóg. Hinvegin kunnu tær broytingar, sum eru skotnar upp, vera ein ávegis loysn, meðan arbeitt verður við nýggju lógini.

Arbeiðið við verkætlanini er skipað við einum stýrisbólki mannaður við Jákup Paula Joensen, Jóhannu Olsen, Peturi Nielsen og Tróndi Leivssyni á Umhvørvisstovuni. Skrivað frágreiðingina hevur Suni Petersen á Umhvørvisstovuni.

[1] Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing við seinni broytingum

# 3 Verandi skipan

Náttúruvernd er skipað eftir løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing við seinni broytingum.

Uppskotið til náttúrufriðingarlóg varð gjørt í fimmti árunum av táverandi sorinskrivara, E. A. Bjørk, sum sendi uppskotið til landsstýrið við viðmerkingum hin 15. august 1959. Lógin, sum varð samtykt í 1970, hevur við bert heilt fáum undantøkum, sama orðaljóð sum uppskotið frá 1959.

Lógin er gjørd við støði í táverandi lóggávu á økinum í hinum norðurlondunum.

## 3.1 Náttúrufriðingarlógin

Lógin er býtt upp í fimm partar eftir innihaldi.



**Fyrsti partur** fevnir um §§ 1-5, og inniheldur ásetingar um verju av náttúruni, at inntriv bert kunnu fara fram sambært loyvi frá friðingarmyndugleikanum og hvørji atlit skulu takast, tá slík loyvi verða givin.

**Annar partur** fevnir um §§ 6 – 9, og hevur ásetingar um friðing, t.e. hvørji øki, lutir o.a. kunnu friðast, og hvussu friðingar kunnu verða framdar.

**Triði partur** fevnir um friðingarmyndugleikarnar, t.e. lokalu friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndina.

**Fjórði partur** er um viðgerð av málum í friðingarnevndunum.

**Fimti partur** er um viðgerð av málum í yvirfriðingarnevndini.

**Í sætta parti** eru revsiásetingar og ásetingar um, at útreiðslur til virki hjá friðingarnevndum og yvirfriðingarnevndini verða goldnar av landskassanum.

Í fylgiskjali 1 er eitt yvirlit yvir innihaldið í hvørjari einstakari grein í lógini.

## 3.2 Myndugleikarnir

Fyrisitingarligu stovnarnir, sum eru nevndir í lógini eru landsstýrið, lokalu friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndin.

### 3.2.1 Landsstýrið

Landsstýrið hevur sambært lógini ávísar heimildir. Fyrisitingin av náttúrufriðingarlógini er løgd til landsstýrismannin í innlendismálum.

Sambært § 8 kann landsstýrið eftir tilmæli frá yvirfriðingarnevndini í kunngerð áseta, at ávís plantu- og djórasløg og jarðfrøðilig fyribrigdi skulu vera friðað í øllum ella pørtum av landinum.

Landsstýrið velur limirnar í friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini.

Avgerðir hjá yvirfriðingarnevndini, sum bera í sær útreiðslur hjá tí almenna omanfyri 500 kr., skulu góðkennast av landsstýrinum, áðrenn tær fáa gildi.

### 3.2.2 Lokalu friðingarnevndirnar



Í hvørjari av teimum seks sýslunum verður vald friðingarnevnd við trimum limum. Sýslumaðurin er formaður, meðan landsstýrið velur hinar báðar limirnar.

Friðingarnevndirnar skulu viðgera mál um loyvi til bygging, vegagerð o.a. á økjum, sum eru fevnd av §§ 2-4 og mál um friðing sambært § 6 í lógini.

Friðingarnevndirnar hava sambært § 12 fund eftir áheitan frá yvirfriðingarnevndini, Jarðarráðnum ella landsstýrinum. Eisini hava tær fund eftir áheitan frá kommunum ella einstaklingum, ið ynskja mál um friðing tikið upp ella ynskir at fáa eitt loyvi sambært §§ 2-4 í lógini. Nevndirnar hava harumframt fund eftir egnum ynski.

### 3.2.3 Yvirfriðingarnevndin

Yvirfriðingarnevndin hevur fimm limir. Hesir eru sorinskrivarin, sum er formaður, landsantikvarurin, leiðarin á Náttúrugripasavninum og tveir limir, sum landsstýrið velur.

Avgerðir hjá lokalu friðingarnevndunum kunnu kærast til yvirfriðingarnevndina. Nevndin skal eisini staðfesta allar avgerðir, sum eru tiknar í lokalu friðingarnevndunum, hóast eingin kæra er.

Um yvirfriðingarnevndin ikki kann góðtaka eina avgerð hjá eini av friðingarnevndunum, skal hon senda málið til nýggja viðgerð í friðingarnevndini. Yvirfriðingarnevndin kann tó gera av, at viðgera málið sum kærumál, og taka avgerð í málinum. Í flestu førum verða avgerðirnar hjá lokalu friðingarnevndunum tó staðfestar.

Avgerðir hjá yvirfriðingarnevndini eru endaligar, og kunnu ikki leggjast fyri dómstólarnar. Nevndin kann tó taka mál upp til nýggja viðgerð.

Yvirfriðingarnevndin gevur eisini tilmæli til landsstýrið um reglur um undantøk fyri bygging sambært § 2, stk. 2 og um friðing av ávísum plantu- og djórasløgum sambært § 8 í lógini.

## 3.3 Fyrisitingin

Hesin partur byggir á eina gjøgnumgongd av málum hjá yvirfriðingarnevndini og lokalu friðingarnevndunum. Talan er serliga um ein samandrátt av øllum málum hjá yvirfriðingarnevndini frá 1970 til 1999, sum táverandi Oljumálastýrið lat gera í 2003. Harumframt hevur Umhvørvisstovan gjøgnumgingið nýggjari mál hjá yvirfriðingarnevndini og lokalu friðingarnevndunum. Talan er tó ikki um eina fullfíggjaða gjøgnumgongd av øllum málum. Innan karmarnar av verkætlanini hevur tað ikki verið gjørligt.

Tær niðurstøður, sum komið er fram til, byggja tí ikki á eitt fullfíggjað grundarlag, og skulu tí takast við ávísum fyrivarni. Hildið verður tó, at tær geva eina góða ábending um, hvussu mál verða viðgjørd av friðingarmyndugleikunum.

Flestu málini, sum verða viðgjørd í lokalu friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini eru umsóknir um verkætlanir o.a. á økjum, har tað sambært lógini krevst loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Tað snýr seg um umsóknir um bygging av seyðahúsum o.ø., uppseting av antennum, at gera vegir, gøtur og brýr o.a. Eisini verða broytingar í byggisamtyktum, sum fevna um øki, fevnd av § 2 í lógini, vanliga lagdar fyri friðingarnevndirnar til ummælis, hóast einki beinleiðis krav er um tað í lógini.




Í fleiri førum eru málini rættiliga einføld, og kunnu avgreiðast uttan nakrar kanningar og kanska eisini uttan at neyðugt er hjá friðingarnevndini at fara á staðið.

Aðrar umsóknir taka drúgva tíð at viðgera. Tað eru serliga umsóknir um størri verkætlanir sum t.d. vatnorkuútbyggingar hjá SEV, men eisini um eitt nú vegir og gøtur. Mál um friðing av økjum krevja eisini vanliga drúgva viðgerð.

Sambært Hagstovuni hevur samlaða talið av málum, sum eru viðgjørd í yvirfriðingarnevndini seinastu mongu árini, verið millum uml. 50 og 80 um árið. Tað er tí eisini samlaða talið av málum í teimum lokalu friðingarnevndunum.

Sambært § 2, stk. 5 og § 4 í lógini kunnu bara verkætlanir loyvast, sum ikki missprýða ella skemma í landslagnum. Tvs. at lógin bara leggur upp til, at tað er útsjónd av landslagi, sum skal varðveitast, meðan einki verður nevnt um at verja plantu- og djóralív.

Eingin heimild er tí í lógini fyri, at friðingarmyndugleikarnir kunnu krevja kanningar av plantu- og djóralívi, metingar av livimøguleikunum ella umhvørvisárinsmetingum o.s.fr. í sambandi við viðgerð av málum um loyvi at fara undir verkætlanir, sum krevja loyvi frá friðingarmyndugleikunum.

Hóast hetta hevur yvirfriðingarnevndin í fleiri førum kravt skrásetingar av djóra- og plantulívi á økinum sum treyt fyri at geva loyvi. Í onkrum føri er eisini sett krav um skráseting av fornminnum í aktuella økinum, og at umsøkjarin ger avtalu við ávikavist Náttúrugripasavnið og Føroya fornminnissavn um hetta[2].

Eisini eru dømi um, at yvirfriðingarnevndin hevur kravt árinsmeting áðrenn støða kundi takast til mál. Í teimum førum tykist yvirfriðingarnevndin neyvt at fylgja tilmælunum í árinsmetingini[3].




Av tí, at lógin ikki heimilar kravi um árinsmeting, er í teimum førum, har slíkar metingar eru gjørdar, helst talan um eina avtalu partanna millum heldur enn eitt beinleiðis krav.

Tað, at avgerðir í sambandi við størri verkætlanir byggja á skrásetingar og fakligar metingar av tí ávirkan, sum verkætlanirnar kunnu hava á lívið og eitt nú fornminni í økinum, má metast at vera ein neyðug fortreyt fyri, at avgerðirnar eru væl grundaðar. Hin vegin er tað ivasamt tá yvirfriðingarnevndin áleggur umsøkjarum at gera kanningar o.a., sum ikki eru heimilaðar í lógini, eisini hóast tað verður gjørt sambært avtalu partanna millum.

[2] Stóratjørn og vegagerð í Skálabotni.

[3] Eiði 2 og ætlan um at gera gøtur við Toftavatn.

## 3.4 Útreiðslur til verandi náttúrufyrisiting

Á fíggjarlógini 2010 vórðu 316 tús. krónur settar av til rakstur av virkseminum hjá lokalu friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini. Peningurin fer til lønir, samsýningar, ferða- og dagpening o.a. í sambandi við arbeiðið hjá nevndunum. Sama upphædd er á fíggjarlógini fyri 2011.

# 4 Dagføring av fyrisitingini

Eitt av høvuðsendamálunum við verkætlanini er at gera uppskot til dagføring av fyrisitingini av náttúruverndarøkinum við støði í galdandi náttúruverndarlóg.

Sum áður nevnt, er verandi náttúrufriðingarlóg og fyrisiting yvir fjøruti ára gomul. Samfelagið og ikki minst fyrisitingin er sera nógv broytt hesi árini, og er tí lítið at ivast í, at fyrisitingin treingir til at verða nútímansgjørd.

Í sambandi við hesa verkætlan hevur Umhvørvisstovan m.o. havt fund við fyrrverandi formenn í lokalum friðingarnevndum og núverandi formannin og skrivaran í yvirfriðingarnevndini. Breið semja tykist vera um, at skipanin er ótíðarhóskandi, og at tørvur er á eini dagføring.

Skal ein nútímans fyrisiting av náttúruvernd skipast innan karmarnar av verandi náttúrufriðingarlóg, er neyðugt at gera broytingar í lógini.

Tørvur er á einum størri fakligum og fyrisitingarligum førleika í málsviðgerðini, og eigur fyrisitingin av náttúruverndarøkinum tí at tengjast at einum stovni við teimum neyðugu fakligu og fyrisitingarligu førleikunum.



Núverandi málsviðgerð í friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini eru ikki fevndar av fyrisitingarlógini. Tað verður mett sum ein avgjørd treyt fyri eini nútímans fyrisiting, at hon er fevnd av fyrisitingarlógini.

## 4.1 Uppskot til broytingar

Í verandi lóg eru í útgangsstøðinum øll øki uttangarðs og øki innangarðs nærhendis sjóvarmálanum, áum, vøtnum og skógfriðaðum viðarlundum, friðað fyri bygging v.m. uttan loyvi frá friðingarmyndugleikunum[4]. Mett verður, at henda meginregla er skilagóð, og verður mælt til at varðveita hana.

[4] Sambært kunngerð nr. 101 frá 26. august 2003 um byggilendi í Fámjins kommunu, eru ávís øki í kommununi undantikin forboðnum í § 2, stk. 2 móti bygging uttan loyvi frá friðingarnevndini.

Kommunalar økisskipanir eftir býarskipanarlógini[5] regulera nýtsluna av lendi, sum m.a. fevnir um øki, ið eru fevnd av oman fyri nevndu friðing eftir náttúrufriðingarlógini. Hesar lendisreguleringar eiga at verða samskipaðar soleiðis, at øki, ið verða avløgd til ávís endamál í kommunalum byggisamtyktum, ikki verða fevnd av ásetingunum í § 2 í náttúrufriðingarlógini um forboð móti bygging o.a. Men tá er sjálvandi neyðugt, at broytingarnar í byggisamtyktum, ið umfata nevndu øki, verða góðkendar av friðingarmyndugleikanum.

Í sambandi við eina dagføring av lógini verður mælt til, at ásetingarnar, sum heimila kravi um árinsmetingar og møguliga skráseting av plantu- og djóralívi, fornminnum o.ø. verða settar inn í lógina.

Niðanfyri er uppskot til, hvussu fyrisitingin kann verða skipað, og ein ábending um, hvørjar lógarbroytingar eru neyðugar í tí sambandi.



## 4.2 Fyrisitingarligur stovnur

Skotið verður upp at varðveita teir partarnar av galdandi náttúrufriðingarlóg, sum hava ásetingar um náttúruvernd og náttúrufriðing, t.e. partarnir I og II, meðan ásetingarnar um myndugleikarnar, t.e. partarnir III, IV og V um friðingarmyndugleikarnar og viðgerð av málum í lokalu friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini, verða strikaðir.

Í staðin verða nýggjar ásetingar um fyrisitingarliga myndugleikan settar inn í lógina.

Tað er umráðandi fyri rættartrygdina, at fyrisitingin fylgir ásetingunum í fyrisitingarlógini, t.d. um partshoyring, at avgerðir verða grundgivnar, at avgerðir kunnu kærast og at givin verður kæruvegleiðing.

Skotið verður upp, at allar avgerðir í málum sambært §§ 2-4 verða lagdar til ein myndugleika, sum hevur fyrisitingarligar royndir og fakligan førleika á náttúruøkinum[6]. Tað eru avgerðir, sum í verandi skipan verða tiknar av friðingarmyndugleikunum, t.e. lokalu friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini.

[5] Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum.

[6] Hetta er sami leistur, sum verður brúktur í uppskotinum til nýggja náttúruverndarlóg.

Áðrenn avgerðir verða tiknar, eiga mál at verða løgd fyri avvarðandi kommunur, viðkomandi almennar stovnar og nevndir[7], áhuga- og fakfeløg[8] og privatpersónar[9], sum kunnu ætlast at hava serligan áhuga í málinum, til ummælis.

Avgerðir eiga at kunna kærast, t.d. til eina kærunevnd. Skotið verður tí upp, at serlig náttúrukærunevnd verður skipað undir Føroya kærustovni, t.d. eftir leistinum í uppskotinum til nýggja náttúruverndarlóg.

Fyrimunurin við hesi skipan er, at fyrisitingin av náttúruvernd verður skipað eftir teimum vanligu fyrisitingarligu grundreglunum í fyrisitingarlógini, og framd av einum stovni, sum hevur fyrisitingar royndir og fakligar førleikar á náttúru- og umhvørvisøkinum, og sum kann seta fólk til burturav at fáast við hetta arbeiði.

Ein vansi í mun til galdandi skipan kann vera, at lokala ávirkanin á avgerðirnar verður minni við tað, at lokalu friðingarnevndirnar verða avtiknar. Hetta kann verða bøtt um við at málini verða send til hoyringar hjá feløgum og einstaklingum lokalt.



Um uppskotið at leggja alla fyrisitingina til ein fakligan stovn, verður hildið at vera ov langt frá verandi skipan, kann ein skipan, sum líkist núgaldandi skipan, verða vald.

Um so er, verður ikki mett rætt at varðveita eina friðingarnevnd í hvørjari sýslu, men heldur at skipa eina friðingarnevnd fyri alt landið. Fyri at varðveita ta lokalu ávirkanina á avgerðirnar, kunnu ein ella tveir limir í hvørjari sýslu verða partur av nevndini, sum so luttaka, tá mál í viðkomandi sýslu eru til viðgerðar.

Ein fakligur stovnur við bæði fyrisitingarligum og fakligum førleika eigur at vera sekretariat hjá nevndini, og taka sær av dagliga arbeiðinum, t.e. at upplýsa mál, savna tilfar og greiða mál til avgerðar.

[7] Náttúrugripasavnið, Fornminnissavnið, Biofar, Jarðarráðið, Skógfriðingarnevndin, Býarskipanarnevndin o.o.
[8] FNU, Lívfrøðingafelagið, Fuglafrøðifelagið, Sílaveiðifelagið, Kamping, frítíðarfeløg, viðkomandi fakfeløg o.o.

[9] Eigarar, grannar o.o.

Fyrimunurin við hesi skipan kann vera, at hon líkist verandi skipan við eini friðingarnevnd, og at tann lokala ávirkanin á avgerðirnar verður varðveitt. Vansin er, at skipanin ikki er í tráð við vanligu fyrisitingina við einum fakmyndugleika.

Verður henda skipan vald, eigur fyrisitingin at fylgja fyrisitingarlógini, og eiga avgerðir hjá nevndini at kunna kærast, eitt  nú til eina kærunevnd undir Føroya kærustovni sum nevnt omanfyri.

Alt annað líka má roknast við, at ein skipan við eini óheftari friðingarnevnd og einum fakligum stovni sum sekretariati verður dýrari enn ein skipan, har ein stovnur fyrisitur økið. Orsøkin til tað er, at umframt útreiðslur til sekretariatuppgávuna, verða útreiðslur til fundarpengar, ferðaútreiðslur o.a. til nevndarlimirnar.

Saman um tikið verður mett, at nógv fleiri fyrimunirnir eru við at leggja fyrisitingina til ein fakligan stovn, og verður tí mælt til, at fyrisitingin av náttúrufriðingarlógini verður løgd til ein stovn undir landsstýrismanninum.

## 4.3 Lógarbroyting

Sum áður nevnt, er neyðugt við lógarbroytingum, um verandi fyrisiting av náttúruøkinum skal dagførast. Niðanfyri er stutt greitt frá, hvørjar lógarbroytingar eru neyðugar, um tær broytingar, sum eru skotnar upp, skulu gjøgnumførast.



Umframt nevndu broytingar verður mælt til, at ásetingar verða settar inn í lógina um, at myndugleikin kann krevja árinsmetingar, kanningar o.a. í sambandi við viðgerðina av málum, sum kunnu ætlast at hava stóra ávirkan á landslag, plantu- og djóralív o.a. Tá er serliga talan um størri verkætlanir.

Eisini eiga ásetingar um eftirlit at verða settar inn í lógina.

Harafturat eigur at verða umhugsað at gera ymiskar konsekvensrættingar, har lógarteksturin verður tilrættaður, t.d. tá sipað verður til friðingar- og yvirfriðingarnevnd. Men eisini t.d. § 1, stk. 3, har ásett er, at "gomul og ónýtilig før skulu høggast upp *ella søkkjast á støðum, har tey ikki eru til bága fyri sigling ella fiskiskap*". Henda áseting gongur beinleiðis ímóti forboðnum móti at søkkja skip í havumhvørvislógini, sum er grundað á altjóða sáttmálar.

### 4.3.1 Árinsmetingar, kanningar o.a.

Fyri at fáa greiðari reglur um, at atlit skulu takast til djóra- og plantulív, livimøguleikar, lívfrøðiligt margfeldi o.a. eins væl og landslag, útsjónd og fornminni, verður skotið upp, at nýggjar ásetingar verða settar inn í § 2 í lógini. Sí fylgiskjal 2.

### 4.3.2 Eftirlit

Í galdandi náttúrufriðingarlóg er eingin áseting um eftirlit við, at ásetingarnar í lógini verða hildnar ella við, at avgerðirnar hjá friðingarmyndugleikunum verða fylgdar.

Fyri at tryggja hesum, eiga ásetingar um eftirlit at verða settar inn í lógina.

### 4.3.3 Náttúruvernd til ein fyrisitingarligan stovn

Neyðugu lógarbroytingarnar eru í stuttum, at tær ásetingar í lógini, sum viðvíkja friðingarmyndugleikunum, verða skiftar út við nýggjum ásetingum:

Hesir partar verða strikaðir: partur III um friðingarmyndugleikarnar, partur IV um viðgerð av málum í friðingarnevndunum, og partur V um viðgerð av málum í yvirfriðingarnevndini.

Nýggjur partur III um myndugleikan verður settur inn. Í fylgiskjali 2 er eitt stutt uppskot til, hvussu hesin parturin kann verða orðaður. Umframt nevnda uppskot verður neyðugt at gera konsekvensrættingar í fyrsta parti, har friðingarnevnd og yvirfriðingarnevnd koma fyri.

# 5 Verandi friðingar

Sambært tilfari frá yvirfriðingarnevndini frá 1979 til 1999 eru fleiri friðingar samtyktar í lokalu friðingarnevndunum og staðfestar í yvirfriðingarnevndini. Talan er um friðing av ávísum størri økjum umframt friðing av einstøkum lutum, steinum, laðaðum gørðum o.ø.

Nevndu friðingar eru ymiskar í vavi eins og treytirnar fyri økisfriðingarnar eru ymiskar.

Tað hevur tó ikki innan karmarnar av hesi verkætlan verið gjørligt at gjøgnumganga skjølini aftan á 1999 nágreiniliga, og er tað tí ikki greitt, um aðrar friðingar eru samtyktar eftir 1999.

## 5.1 Økisfriðingar

Tríggjar økisfriðingar eru samtyktar. Tað snýr seg um økið frammi við Gjónna og Leynavatn, Mølheyggjar á Sandi og Fjallavatn í Vágum.

### 5.1.1 Leynavatn

Økið Frammi við Gjónna og Leynavatn varð friðað við samtykt í yvirfriðingarnevndini og lýst í Dimmalætting hin 18. juli 1983. Økið fevnir um Miðgerðarhaga og Hamrahaga frammi við Gjógv, eitt øki við Mjáuvøtn og fram við Leynará oman mótið sjónum. Tað snýr seg m.a. um partar av matr. nr. 311 og 312 í Kollafirði og matr. nr. 80a og 401a í Leynum.



Sambært friðingartreytunum skal økið varðveitast í sínum natúrliga líki við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðiligum fyribrigdum. Øll bygging, setan av elsteyrum o.ø., tøka av gróti, eyri, plantum o.ø. eru bannað.

Friðingin ber tó ikki við sær avmarkingar í nýtsluni av økinum til landbúnaðarendamál, so sum uppdyrking. Friðingarmyndugleikarnir kunnu eisini gera undantøk í forboðnum fyri bygging, um talan er um bygging til landbúnaðarendamál.

Friðingin er lýst í Dimmalætting og treytirnar eru tinglýstar á avvarðandi ognir. Sí fylgiskjal 3.

### 5.1.2 Mølheyggjar

Mølheyggjar heima á Sandi og økið uttan um teir varð friðað við samtykt í yvirfriðingarnevndini og kunngjørt í Dimmalætting hin 18. juli 1983.

Friðingin fevnir um matr. nr. 177 og part av matr. 329 á Sandi.

Sambært friðingartreytunum skal økið varðveitast í sínum natúrliga líki við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðiligum fyribrigdum. Øll bygging, setan av elsteyrum o.ø., tøka av gróti, eyri, plantum o.ø. eru bannað.



Friðingin er lýst í Dimmalætting og treytirnar eru tinglýstar á avvarðandi ognir. Sí fylgiskjal 3.

### 5.1.3 Fjallavatn

Fjallavatn, Tórmanshólmur, Uttanhúsoyrar og eitt 20 m breitt øki uttan um Fjallavatn varð friðað við samtykt i lokalu friðingarnevndini, staðfest av yvirfriðingarnevndini og lýst í Dimmalætting hin 2. august 1988.

Sambært friðingartreytunum skal økið varðveitast í sínum natúrliga líki við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðiligum fyribrigdum. Øll bygging, setan av elsteyrum o.ø., tøka av gróti, eyri, plantum o.ø. eru bannað. Friðingin ber tó ikki við sær avmarkingar í nýtsluni av økinum til landbúnaðarendamál, so sum uppdyrking. Tó er nýggj uppdyrking av friðaða økinum bannað. Harumframt er avveiting av mýrilendinum við landsynnings- og útnyrðingssíðuna av vatninum bannað uttan loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Somuleiðis er bannað at pumpa ella á annan víðfevndan hátt at taka vatn úr Fjallavatni.

Sum skilst varð málið um friðing reist tí at SEV hevði ætlanir um at gera vatnorkuverk í Vágum og nýta Fjallavatn sum vatngoymslu.

Sum tað sæst av tilfarinum í málinum, hava ymsar metingar av plantu- og djóralívi, sum eru gjørdar av m.ø. Náttúrugripasavninum eins og fuglateljing við Fjallavatn brúkt sum grundarlag undir viðgerðini í friðingarnevndini.

Friðingin er lýst í Dimmalætting,  men einki er tinglýst á avvarðandi ognir. Sí fylgiskjal 3.

### 5.1.4 Toftavatn

Í kunngerð í Dimmalætting hin 18. mars 1994 verður sagt frá, at náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu og yvirfriðingarnevndin hava gjørt av at friða økið uttan um Toftavatn. Treytirnar í friðingini eru, at økið skal varðveitast í sínum núverandi líki, og at øll bygging, tøka av tilfari, plantum o.ø. er forboðin.

Samstundis verður lýst til fundar á staðnum, har øll kunnu fáa høvi at bera síni sjónarmið fram.

Í málinum eru yvirlit frá Náttúrugripasavninum yvir plantur og fuglasløg við Toftavatn. Eisini er kanning frá Føroya fuglafrøðifelag um fuglakanningar við Toftavatn 1988-1992.



Friðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu hevur seinni samtykt, at tað ikki er neyðugt at friða økið við Toftavatn tí at mett varð, at økið er nóg væl vart eftir galdandi reglum, t.e. generellu reglunum í lógini um øki uttangarðs. Yvirfriðingarnevndin hevur staðfest avgerðina. Toftavatn er sostatt ikki friðað við serstakari friðing sambært lógini.

## 5.2 Aðrar friðingar

Umframt tær tríggjar økisfriðingarnar, hava friðingarnevndirnar samtykt eina røð av øðrum friðingum, sum eru staðfestar av yvirfriðingarnevndini. Tað snýr seg um smærri øki, steinar, høv, garðar o.s.fr.

Tað er ikki greitt um hesar friðingar eru lýstar alment, men einki tilfar er í málinum, sum bendir á tað. Heldur ikki eru nakrar av hesum friðingum tinglýstar.

Av tí at tilfarið, sum hevur verið tøkt, ikki er fullfíggjað, eru kanska ikki allar upplýsingar um einstøku friðingarnar í talvuni. Ivasamt er eisini um øll matrikkulnumrini eru røtt.

| Friðing | Dagfest | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| Leirubø í Hvalba | 16-05-1984 | |
| Partur av kirkjugarði í Svínoy | 07-02-1978 | Matr. nr. 148, Svínoy.<br><br>Gamal trílaðaður garður, sum er partur av kirkjugarði í Svínoy. Garðurin skal framvegis standa frítt |
| Urðingarhálsur og Ásdalur á Froðba | 23-06-1978 | Matr. nr. 133 ella 134 (?), Froðba<br><br>Økið hevur verið brúkt til burturkast. Avgjørt at friða økið tá tað er ruddað. |
| Frílendisútlegging ísv. bygdaplanir í Vestmanna, Hvalvíkar, Sunda, Gøtu og Runavíkar kommunu. | ? | Treyt frá yvirfriðingarnevndini, at tað á nevndu økjum ikki má byggjast nakað. |
| Havið hjá Janusi við Gjónna, Halganarsteini og Gálgasteini í Kollafirði. | 27-02-1975 | Matr. nr. 339(?), Kollafjørður |
| Skipar Hansens steinur á Hálsi í Havn | 19-12-1975 | Matr. nr. 1385a, Tórshavn<br><br>Áheitan á Tórshavnar kommunu um at rudda og seta steinin í upprunaligan stand. |
| Friðing móti sandtøku millum Týggjará og Traðarstýggj í Kaldbak | 25-01-1974 | Út fyri Matr. 3a ella 4 (?), Kaldbak |
| Tvey hválv á Tvøroyri. | 21-02-1975 | Matr. nr. 304, 305 og 281 á Tvøroyri<br><br>Friðað fyri at forða fyri, at farið verður undir vegagerð. |

## Fylgiskjal 1: Samandráttur av løgtingslóg um náttúrufriðing

### I Partur: Náttúruvernd

Í § 1 eru ásetingar um, at burturkast o.a. ikki má tveitast í náttúruni, og at tað kann takast burtur fyri eigarans rokning.

§ 2 ásetur, at tað ikki er loyvt at byggja uttangarðs uttan loyvi frá friðingarmyndugleikanum, umframt at tað eisini krevst loyvi til bygging á ávísum støðum innangarðs, t.e. í ávísari frástøðu frá sjóvarmálanum, áum, vøtnum og skógfriðaðum viðarlundum.
Harumframt eru ásetingar um hvørji atlit skulu takast, tá friðingarmyndugleikarnir viðgera umsóknir um bygging o.a.

§ 3 hevur ásetingar um, at tøka av gróti, mold o.ø. og torvskurður skal fara fram soleiðis, at tað skemmur náttúruna sum minst.
Eisini er ásett, at friðingarmyndugleikin kann seta forboð fyri tøku av gróti o.ø., og at loyvi krevst til grótbrot.

§ 4 ásetur, at arbeiðir skulu gerast soleiðis, at tey misprýða og skemma sum minst, og at vegagerð o.a. skal hava loyvi frá friðingarmyndugleikanum.

§ 5 setur forboð fyri útilýsingum burtur frá bygdum øki.

### II Partur: Náttúrufriðing

Í § 6 er ásett, at øki, landsløg, áir, vøtn, træhópar o.a. kunnu verða friðað. Eisini er ásett hvørji atlit kunnu liggja til grund fyri eini friðing.

§ 7 umrøður friðing av fornminnum, bygningum og fuglabjørgum.

Í § 8 er ásett, at landsstýrið eftir tilmæli frá yvirfriðingarnevndini kann friða ymisk sløg av plantu- og djórasamfeløgum í øllum ella pørtum av landinum.

§ 9 ásetur, at setast kunnu treytir í sambandi við friðingar, t.e. hvat virksemi og hvørji inntriv kunnu loyvast ella um lendið skal varðveitast í sínum upprunaliga líki.

## III Partur: Friðingarmyndugleikarnir.

Sambært § 10 skal í hvørji sýslu setast friðingarnevnd við trimum limum. Sýslumaðurin er formaður meðan landsstýrið velur hinar báðar fyri seks ár í senn.

Sambært § 11 verður sett yvirfriðingarnevnd fyri alt landið við fimm limum. Teir eru sorinskrivarin, sum er formaður, landsfornfrøðingurin, leiðarin á náttúrusavninum og tveir limir, sum landsstýrið velur fyri seks ár í senn.

## IV Partur: Viðgerð av málum í friðingarnevndunum.

§§ 12 og 13 snúgva seg um fundir í náttúrufriðingarnevndunum: nær fundir skulu vera, hvør kallar inn, at nevndin kann fara á staðið málið snýr seg um, hvør skal boðast til fundar, hvussu hetta verður gjørt o.s.fr.

§§ 14, 15 og 16 snúgva seg um viðgerð í sambandi við friðingarmál.

§§ 17 og 18 eru um úrskurðir, sum bera í sær ognartøku.

§ 19 er um hvussu avgerðir hjá nevndini skulu festast, t.d. við tinglýsing.

§ 20 ásetur, at friðingarnevndin kann taka av friðingarreglur, ið ikki longur haldast at hava týdning.

## V Partur: Viðgerð av málum í yvirfriðingarnevndini.

Sambært § 21 kunnu avgerðir hjá lokalu friðingarnevndunum kærast til yvirfriðingarnevndina. Men hóast eingin kæra kemur, skulu øll mál kortini viðgerast í yvirfriðingarnevndini, sum skal taka støðu til, um avgerðirnar kunnu góðtakast.

Í §§ 22 og 23 eru ásetingar um arbeiðsháttin hjá nevndini.

Sambært § 24 eru avgerðir hjá nevndini endaligar, og kunnu ikki leggjast fyri dómstólarnar. Nevndin kann tó taka mál upp til nýggja viðgerð.

## VI Partur: Niðurstøða

§§ 24, 25 og 26 fevna um revsiásetingar um, at útreiðslur til virki hjá friðingarnevndum og yvirfriðingarnevndini verða goldnar av landskassanum, og um gildiskomu.

## Fylgiskjal 2: Uppskot til lógarbroytingar

### Víðkað atlit, árinsmetingar v.m.

Niðanfyri er uppskot til nýggja orðing av § 2, stk. 1 og stk. 5 fyri at tey atlit, sum skulu takast, tá støða verður tikin til umsóknir um bygging og onnur inntriv uttangarðs, kunnu víðkast til eisini at fevna um djóra- og plantulív, liviumstøður o.a.

§ 2 í lógini verður orðað soleiðis:

**§ 2.** Uttangarðs er ikki loyvt at fremja inntriv, ið kunnu ávirka náttúru og umhvørvi, herundir plantu- og djóralív, útsjónd ella á annan hátt skemma ella misprýða uttan loyvi frá landsstýrismanninum. Undantiknir eru tó smærri bygningar, sum eftir gomlum siði vanliga hava verið bygdir uttangarðs í samband við landbúnaðin, tá ið teir ikki skemma natúruna.

…

*Stk. 5.* Tá ið avgerð skal takast um loyvi, hóast forboðið í stk. 1-2, skal ætlast um alla ta ávirkan, sum viðkomandi verkætlan kann hava, herundir á plantu- og djóralív, lívfrøðiligt margfeldi, útsjónd o.a. Í hesum sambandi kann *myndugleikin* krevja, at byggiharrin letur gera árinsmetingar, kanningar av djóra- og plantulívi o.a.

### Náttúruvernd til ein fyrisitingarligan stovn

Niðanfyri er uppskot til orðingar ísv. at leggja fyrisitingina av náttúruvernd til ein fyrisitingarligan stovn:

<u>III. Partur: Myndugleikin</u>

**§ 10.** Avgerðir sambært §§ 2-5 verða tiknar av *landsstýrismanninum*[10].
*Stk. 2.* Áðrenn avgerð sambært stk. 1 verður tikin, skal umsóknin/málið leggjast fyri viðkomandi kommunur, myndugleikar, áhugafeløg og privatpersónar til hoyring.
*Stk.3.* Landsstýrismaðurin kann taka avgerð ella gera reglur um viðgerð av málum sambært lógini, herundir hvørjir myndugleikar, feløg, einstaklingar o.o. skulu hoyrast.

<u>IV. Partur: Eftirlit</u>

**§ 11.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við, at ásetingarnar í lógini, reglur, ásettar við heimild í lógini og avgerðir tiknar við heimild í lógini, verða hildnar.

[10] Ætlanin er, at avgerðirnar skulu takast av einum fyrisitingarligum stovni undir landsstýrismanninum. Vanliga verða ávísir stovnar ikki nevndir í lógartekstinum.

V. Partur: Fyrisitingarligar reglur og kæra

§ 12. Landsstýrismaðurin kann heimila stovni undir sær ella øðrum landsstovni at útinna tær heimildir, sum eftir hesi lóg eru hjá landsstýrismanninum.
*Stk.2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um kæru, og at ein avgerð bert skal kunna kærast til ávísan kærustovn.

# Fylgiskjal 3: Lýsing av friðaðum økjum

## KUNNGERÐ

**um friðing av økinum Frammi við Gjónna við Mjáuvøtn og Leynavatn v.m.**




Sagt verður frá, at nátúrfriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu og yvirfriðingarnevndin sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 II. parti, hevur gjørt av at friða økið Frammi við Gjónna, við Mjáuvøtnini og Leynavatn v.m.

Markið gongur úr Leynarósanum og 50 m sunnanfyri Leynará longs vegnum upp móti Klivunum og víðari fram við hamrinum støðugt í mát umleið 50 m nú fram við vegnum til Djúpagil, har markið krossar vegin og fylgir Djúpagili, til markið fer í ein útnyrðing umleið 50 m frá Mjáuvøtnum. Síðani fer markið eftir hagamarkinum millum Hamrahaga, Frammi við Gjógv (matr. nr. 311) og Sjóvarhaga. Fremri Partur (matr. nr. 312) niðan í Hósvíksskarð. Harnæst norðureftir (frameftir) fjallarøðini millum Kollafjørð øðrumegin og Hósvík og Hvalvík hinumegin norður á »Bollan«. Haðani vestur ella niðan á Húsdalsskarð í marknavarðan millum Kollafjørð, Hvalvík og Kvívík. Haðani eftir markinum millum Húsadalshaga í Hvalvík og Presthagan niðan á Sneis. Av Sneis fer markið suðureftir hagamarkinum millum Ognarhagan og Presthagan í Kvívík um Stígarnar í Argisá og fylgir Argisá oman gjøgnum Presthagan til umleið 280 m hædd. Haðani í ein landsynning í beinari kós í lítlan hamara, fram við hesum hamri oman á Drangarnar. Haðani gongur markið vesturyvir og fylgir hamrinum í mát umleið 50 m longs Leynará oman móti sjónum.

Tað friðaða økið er uppmerkt á »generalstabskorti.«

Friðingin ber sambært § 9 í natúrfriðingarlógini í sær, tá ikki annað við úrskurði er ásett, at umrødda økið skal varðveitast í sínum nátúrliga líki og við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðisligum fyribrigdum varðveitast óbroytt, soleiðis at serstakliga øll bygging, setan av steyrum, búðum ella øðrum hesum lík, ið kunnu misprýða, eins væl og tøka av gróti, mold, sandi, eyri, leiri, plantum og djórum er forboðin.

Friðingin ber tó ikki í sær avmarking av nýtsluni av økinum sum higartil til landbúnaðarendamál, herundir uppdyrking. Friðingarmyndugleikarnir kunnu eisini gera frávik frá forboðnum um bygging, tá talan er um bygging til landbúnaðarendamál.

FØROYA YVIRFRIÐINGARNEVND
hin 18. juli 1983
**J. Andreassen**
fm. .

## KUNNGERÐ

**um friðing av mølheyggjunum Heima á Sandi**




Sagt verður frá, at yvirfriðingarnevndin sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 II. parti, hevur gjørt av at friða mølheyggjarnar Heima á Sandi og lendið uttan um teir.

Tað friðaða økið, ið umfatar matr. nr. 177 og part av matr. nr. 329, er avmarkað vestureftir av ánni niðan har vegurin »an« Niðri við Holið endar. Haðani gongur markið suðuryvir millum matr.nr. 177 og matr. nr. 329 øðrumegin og eigindómarnar eystanfyri hinumegin oman í fjøruna. Sunnanfyri gongur markið 30 metrar frá mølheyggjunum oman móti sjóvarmálanum. Økið er víst á matrikulkorti.

Friðingin ber sambært § 9 í natúrfriðingarlógini í sær, tá ikki annað við úrskurði er ásett, at umrødda økið skal varðveitast í sínum nátúrliga líki og við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðisligum fyribrigdum varðveitast óbroytt, soleiðis at serstakliga øll bygging, setan av steyrum, búðum ella øðrum hesum lík, ið kunnu misprýða, eins væl og tøka av gróti, mold, sandi, eyri, leiri, plantum og djórum er forboðin.

FØROYA YVIRFRIÐINGARNEVND
hin 18. juli 1983
**J. Andreassen**
fm.

# KUNNGERÐ
## um friðing av Fjallavatni v.m.




Sagt verður frá, at náttúrfriðingarnevndin fyri Vága sýslu og yvirfriðingarnevndin sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 II. parti, hava gjørt av at friða Fjallavatn, Tórmanshólm, Uttanhúsoyrar og eitt øki runt um vatnið ásett við beinum linjum millum ávís »koordinatpunkt«.

Tað friðaða økið er eitt minst 20 metrar breitt belti uttanum Fjallavatn. Við landsynningssíðuna av vatninum gongur tað einar 350-450 metrar inn í hagan.

Tað friðaða økið er uppmerkt á »generalstabskorti«.

Friðingin ber sambært § 9 í náttúrfriðingarlógini í sær, tá ikki annað við úrskurði er ásett, at umrødda økið skal varðveitast í sínum náttúrliga líki óbroytt við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðiligum fyribrigdum, soleiðis at serstakliga øll bygging, setan av steyrum, búðum ella øðrum hesum lík, ið kunnu misprýða, eins væl og tøka av gróti, mold, sandi, eyri, leiri, plantum og djórum er forboðin. Friðingin ber tó ikki í sær avmarking av nýtsluni av økinum sum higartil til landbúnaðarendamál, herundir uppdyrking.

Sambært § 9, 2. petti, í náttúrfriðingarlógini verður nýggj uppdyrkan av tí friðaða tó bannað.

Avveiting av mýrilendinum við landsynnings- og útnyrðingssíðuna má somuleiðis bert fara fram við loyvi frá friðingarmyndugleikunum.

Tað er ikki loyvt at pumpa ella á annan víðfevnandi hátt taka vatn úr Fjallavatni.




Sagt verður frá, at náttúrfriðingarnevndin fyri Vága sýslu og yvirfriðingarnevndin sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 II. parti, hava gjørt av at friða Fjallavatn, Tórmanshólm, Uttanhúsoyrar og eitt øki runt um vatnið ásett við beinum linjum millum ávís »koordinatpunkt«.

Tað friðaða økið er eitt minst 20 metrar breitt belti uttanum Fjallavatn. Við landsynningssíðuna av vatninum gongur tað einar 350-450 metrar inn í hagan.

Tað friðaða økið er uppmerkt á »generalstabskorti«.

Friðingin ber sambært § 9 í náttúrfriðingarlógini í sær, tá ikki annað við úrskurði er ásett, at umrødda økið skal varðveitast í sínum náttúrliga líki óbroytt við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðiligum fyribrigdum, soleiðis at serstakliga øll bygging, setan av steyrum, búðum ella øðrum hesum lík, ið kunnu misprýða, eins væl og tøka av gróti, mold, sandi, eyri, leiri, plantum og djórum er forboðin. Friðingin ber tó ikki í sær avmarking av nýtsluni av økinum sum higartil til landbúnaðarendamál, herundir uppdyrking.

Sambært § 9, 2. petti, í náttúrfriðingarlógini verður nýggj uppdyrkan av tí friðaða tó bannað.

Avveiting av mýrilendinum við landsynnings- og útnyrðingssíðuna má somuleiðis bert fara fram við loyvi frá friðingarmyndugleikunum.

Tað er ikki loyvt at pumpa ella á annan víðfevnandi hátt taka vatn úr Fjallavatni.

Føroya yvirfriðingarnevnd, hin 21. juli 1988

**Jógvan Andreassen**

fmd.

Dimmalætting 2/8 '88